LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 22. januar 2025
J.Nr.: LUM-16- 24/27154-15
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um málsviðgerðina hjá Eiðis kommunu í samband við umsókn um keyp av fastogn og garðbygging

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, at Eiðis kommuna ikki svaraði eini umsókn um keyp av fastogn og garðbygging og ikki svaraði fyrispurningunum og innlitsumbønini frá klagaranum í tí sambandi. Umsóknin um keyp av fastogn varð latin kommununi í januar 2024, og fyrispurningar um málið umframt innlitsumbøn varð latin kommununi í mai 2024. Klagarin hevði ikki fingið svar frá kommununi, tá hann klagaði til umboðsmannin í november 2024. Umboðsmaðurin helt tað hvørki vera nøktandi ella í samsvar við góðan fyrisitingarsið, at klagarin ikki hevði fingið svar í næstan eitt ár. Harumframt helt umboðsmaðurin tað vera átaluvert, at átta mánaðir vóru lidnir, uttan at innlitsumbønin var svarað, og at kommunan ikki hevði hildið notatskyldu sína. Umboðsmaðurin gav Eiðis kommunu eina átalu fyri handfaringina av málinum.*

## 2. Málslýsing

Tann 26. november 2024 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> “Eg havi umvegis eidi.fo spurt um keyp av einum matrikli, biðið um loyvi at byggja garð, spurt um avmarkingar hjá "granna", sum er eitt landbúnaðar hús og biðið um innlit í søluni av landbúnaðarhúsi ... Eg skrivaði fyrstu ferð til kommuna í januar 2023 *(seinni rættað til 2024, mín viðmerking)*. Eg sendi teldupostasamskifti sum eg havi haft síðani januar 2023 *(seinni rættað til 2024, mín viðmerking)*. Eg havi rykt eftir svari fleiri ferðir, bæði við telduposti og telefon, men hoyri einki aftur.”

Viðløgd klaguni vóru avrit av samskifti millum klagaran og Eiðis kommunu.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Av skjølunum sást, at klagarin, tann 7. mai 2024, umvegis teldupost sendi Eiðis kommunu fyrispurningar. Hann vísti millum annað á, at hann var áhugaður í at keypa ávísan matrikul og setti ymiskar fyrispurningar hesum viðvíkjandi. Eisini greiddi hann frá sínum ætlanum at byggja garð og spurdi, hvørjar møguleikar hann hevði í tí sambandi.

Viðfest teldupostinum var mynd av viðkomandi matrikli.

Tann 29. august 2024 minti klagarin Eiðis kommunu á málið.

Tann 2. november 2024 minti klagarin enn eina ferð Eiðis kommunu á málið.

Tann 2. november 2024 fekk klagarin soljóðandi svar frá Eiðis kommunu:

> "...
> Takk fyri teldupostin. Eg eri púra samd við tær, at hetta er ikki nøktandi, at tú ikki hevur fingið svar frá kommununi enn, upp á hetta málið.
> Tað skal eg hervið biðja teg um umbering fyri.
> Eg skal finna útav hvar málið liggur, so sigi eg tær frá aftur... "

Tá klagarin onki hoyrdi aftur frá Eiðis kommunu, sendi hann umboðsmanninum eina klagu.

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 27. november 2024 varð klagan send Eiðis kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Eiðis kommuna biðin um at lata umboðsmanninum skjalayvirlitið í málinum.

Tann 28. november 2024 sendi Eiðis kommuna umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> "...
> Víst verður til mail tykkara frá 27. november 2024.
> Kommunan harmast, at A ikki hevur fingið svar uppá fyrispurningin, um at ogna sær matr. nr. B, Eiði.
> A hevur eisini tann 7. mai 2024 biðið um innlit í sølu av matr. nr. F, Eiði.
> Kommunan fer at lata A innlit skjótast gjørligt og miðar eftir at svara fyrispurninginum um at ogna sær matr. nr. B, Eiði, innan 14 dagar.
> Viðfest eru skjølini í málinum.
> …"

Viðfest teldupostinum vóru skjøl í málinum. Tó vórðu øll skjølini, umframt skjalayvirlitið, ikki send umboðsmanninum.

Tann 29. november 2024 sendi umboðsmaðurin Eiðis kommunu teldupost, har millum annað stóð:

> "...

> Tann 28. november 2024 sendi Eiðis kommuna umboðsmanninum frágreiðing og skjøl í málinum. Skjalayvirlitið varð tó ikki sent umboðsmanninum.
> Eiðis kommuna verður tí hervið biðin um at lata umboðsmanninum skjalayvirlitið.
> Klagari hevur víst umboðsmanninum á samskifti, sum hevur verið millum klagara og ... *(borgarstjóran, mín viðmerking)*, tann 2. november 2024, umvegis teldupost, har Eiðis kommuna var cc. Hetta samskiftið sæst ikki í skjølunum, sum Eiðis kommuna hevur latið umboðsmanninum.
> Umboðsmaðurin ynskir tí eina frágreiðing um hetta, herundir, hví hetta samskiftið ikki er latið umboðsmanninum, og hvar tað er skrásett.
> Klagari hevur harumframt víst umboðsmanninum á, at hann í juni og september hevur havt samskifti við Eiðis kommunu umvegis telefon.
> Hevur Eiðis kommuna noterað hetta samskiftið? Um so er, verður Eiðis kommuna biðin um at lata umboðsmanninum avrit av notatunum.
> Biðið verður um, at umbidna tilfar verður umboðsmanninum í hendi innan 3 vikur..."

Tann 2. desember 2024 sendi Eiðis kommuna soljóðandi nærri frágreiðing:

> "...
> Her sendi eg eitt skjalayvirlit yvir tey skjøl sum kommunan hevur móttikið í samband við umsókn um keyp av matr. B á Eiði.
> Eg skal eisini siga frá, at tað eri eg sum havi havt samskifti við klagaran umvegis telefon, og havi eg ikki notera hettar samskifti.
> Tað sum klagarin ringdi um bæði í juni og september, var at vita hvussu tað gekk við umsóknini og segði eg við hann, at umsóknin var løgd til ... *(starvsfólk, mín viðmerking)* og at ... *(viðkomandi, mín viðmerking)* var biðin um at taka tað upp í teknisku nevnd.
> Síðan er ... *(viðkomandi, mín viðmerking)* farin í annað starv og nú vísur tað seg, at hettar mál ongantíð er lagt fyri teknisku nevnd at avgreiða?
> Tekniska nevnd hevur sagt mær, at hettar mál kemur við til fundin mikudagin 04.12.24, so vónandi fær umsøkjarin eitt svar heilt skjótt.
> Vv mailinum sum varð sendur til borgarstjóran, har Eiðis kommuna var cc, hevði eg gloymt at koyrt í journalina og tí var tað ikki sent við mailinum tann 28.november.
> Eg viðhefti tann mailin saman við skjalayvirlitinum.
> Nú skuldu tit havt øll skjølini í sakini…"

Viðfest teldupostinum var eitt til høvið framleitt skjalayvirlit yvir skjølini í málinum.

Tann 3. desember 2024 bað umboðsmaðurin Eiðis kommunu um at senda skjalayvirlitið, avritað úr journalskipan teirra.

Tann 3. desember 2024 sendi Eiðis kommuna umbidna skjalayvirlit.

Tann 3. desember 2024 sendi umboðsmaðurin klagaranum frágreiðingarnar frá Eiðis kommunu til kunningar og møguligar viðmerkingar við einari freist áljóðandi 2 vikur.

Tann 11. desember 2024 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar til frágreiðingarnar frá Eiðis kommunu:

> "...
> Eg havi hesar viðmerkingar til málið

1. Týðningarmikið, at tað er týðuligt at eg fyrstu ferð skrivaði til kommuna januar 2023 *(seinni rættað til 2024, mín viðmerking)* umvegis heimasíðuna. Havi ikki avrit av hesum, tá eg ikki fekk kvittan ella váttan av móttøku.
2. Tað er ikki bert um sølu av matrikli. Tað er eisini ein fyrispurningur um at byggja okkum garð. Eg havi fleiri ferðir gjørt vart við, at ferðslutrupuleikarnar uttanfyri hjá okkum. Har millumannað at bilar seta seg fyri. Eisini hevur ein bilur árent leikur hjá dótturini í túninum hjá okkum tí hesin vendi her. Tað hevur bara verði heldigt, at genturnar ikki sótu og spældu júst í tí løtuni, tí bilurin vendi við høgari ferð. Eg havi sent kommuni myndir leypandi fyri at vísa á skilið.
3. Eg havi ikki bert tosa við kommunuskrivstovuna. Eg havi eisini ringt beinleiðis til formannin í tekniknisku nevnd minst tvær ferðir. Eisini borgarstjóran. Tað verður altíð lova svar- men hetta kemur ongantíð.

   Og, at enda kann eg eisini siga, at eg havi enn ikki hoyrt frá nøkrum í Eiðis kommunu..."

Tann 11. desember 2024 sendi umboðsmaðurin viðmerkingarnar frá klagaranum Eiðis kommunu til viðmerkingar og spurdi í tí sambandi, um skrivið frá klagara til Eiðis kommunu frá januar 2023 *(seinni rættað til 2024, mín viðmerking)* og samskiftið millum klagaran og formannin í teknisku nevnd var skrásett.

Tann 18. desember 2024 sendi Eiðis kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar til viðmerkingarnar frá klagaranum:

> "...
> Eg viðhefti umsóknina frá umsøkjaranum, sum kom inn til kommununa 10. januar 2024.
> Borgarstjórin kennir einki til, at umsøkjarin hevur tosa við hana um keyp av grundstykki matr. B ella fyrispurningin um at gera garð ?
> Tað einasta beinleiðis samband borgarstjórin hevur havt við umsøkjaran, er mailurin hann sendi til hana 02. des 2024.
> Formaðurin í teknisku nevnd sigur seg hava tosa við umsøkjaran, men tað var ikki sum formaður í teknisku nevnd, men sum ein vinur. Teir eru vinmenn, tí er tað nokk ymiskt hvussu teir hava uppfata telefonsamrøðuna.
> So einki telefonnotat er gjørt í samrøðuni millum formannin í teknisku nevnd og umsøkjaran..."

Viðfest teldupostinum var umsókn frá klagaranum um keyp av fastogn.

Tann 2. januar 2025 sendi umboðsmaðurin klagaranum og Eiðis kommunu kunning um, at farið var undir endaliga viðgerð av málinum.

Tann 15. januar 2025 sendi umboðsmaðurin klagaranum soljóðandi uppfylgjandi spurningar:

> "...
> Tú hevur víst á, at tú setti teg í samband við Eiðis kommunu fyrstu ferð í januar 2023.
> Umboðsmaðurin hevur spurt Eiðis kommunu, um tín áheitan frá januar 2023 er skrásett.
> Eiðis kommunan viðfesti í svari til umboðsmannin eina umsókn frá tær um keyp av grundstykki, ið er dagfest tann 10. januar 2024, men nevndi onki um, at nakað var komið inn í januar 2023.
> Umboðsmaðurin vil tí spyrja, um tú hevur skrivað skeivt, og at tú í veruleikanum vendi tær fyrstu ferð til Eiðis kommunu í januar 2024 og ikki í januar 2023?

> Harumframt ynskir umboðsmaðurin at vita, um tú nú hevur fingið innlit, og um so er, nær innlit varð latið tær?
> Biðið verður um, at viðmerkingar tínar verða umboðsmanninum í hendi innan 7 dagar..."

Tann 20. januar 2025 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "...
> Orsaka, har má eg hava skriva skeivt.
> Eg skrivaði fyri fyrstu ferð til tey umvegis heimasíðuna januar 2024.
> Vit hava ikki fingið innlit..."

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um vantandi svar og málsviðgerðartíðina hjá Eiðis kommunu í sambandi við umsókn um keyp av fastogn og garðbygging, viðgerðina av innlitsumbøn og fyrispurningar klagarans í hesum sambandi. Harumframt snýr viðgerðin seg um notatskyldu myndugleikans.

<u>Viðgerðartíð og vantandi svar</u>
Skyldan at svara borgarum er staðfest í góðum fyrisitingarsiði.
Sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur myndugleikin innan rímiliga tíð at viðgera mál og at svara borgara, sum vendir sær til myndugleikan.

Málsgongdin vísir, at klagarin javnan yvir áleið eitt ár síðani januar 2024 hevur vent sær til Eiðis kommunu við umsókn um keyp av fastogn og garðbygging, innlitsumbøn og fyrispurningum í hesum sambandi uttan at fáa greitt skrivligt svar.

Sambært góðum fyrisitingarsiði, er tað ikki nøktandi, at klagarin í eitt tíðarskeið á áleið eitt ár ikki hevur fingið svar til umsókn sína um keyp av fastogn, innlitsumbøn sína og fyrispurningar sínar um keyp av fastogn og um garðbygging.

Eg haldi tað vera átaluvert at drála við viðgerðini og ikki at svara klagaranum innan rímiliga tíð.

<u>Innlitsumbønin</u>
Sambært § 16 í Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mail 2001 (innlitslógin), skulu umbønir um alment innlit avgreiðast sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal myndugleikin boða umsøkjaranum frá orsøkini til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.

Málsgongdin vísir, at klagarin, sum bað um innlit tann 7. mai 2024, ikki hevði fingið svar, tann 28. november 2024, tá Eiðis kommuna svaraði umboðsmanninum, sum er yvir hálvt ár eftir, at biðið varð um innlit.
Hóast Eiðis kommuna, tann 28. november 2024, kunnaði umboðsmannin um, at innlit fór at verða latið klagaranum skjótast gjørligt, hevði kommunan enn ikki latið klagaranum innlit, tann 20. januar 2025.

Svarfreistin, sambært § 16 í innlitslógini, er sostatt ikki hildin.

Endamálið við ásetingini í § 16 í innlitslógini er, at innlitsumbønir eiga at verða viðgjørdar við einum serligum skjótleika og ikki uttan serliga orsøk taka longri tíð, enn neyðugt er.

Eg haldi tað vera sera átaluvert, at Eiðis kommuna ikki hevur hildið svarfreistina, sambært innlitslógini, og enn ikki hevði svarað innlitsumbønini, tann 20. januar 2025, hóast kommunan, tann 28. november 2024, kunnaði umboðsmannin um, at innlit fór at verða latið klagaranum skjótast gjørligt.

Notatskylda myndugleikans
Í málum, har ein fyrisitingarlig avgerð skal takast, hava myndugleikar skyldu at skriva upp upplýsingar, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina, sambært § 6, stk. 1 innlitslógini.
Harumframt áleggur góður fyrisitingarsiður einum myndugleika at skriva upp málsviðgerðarstig, sum hava týdning fyri mál, sjálvt um talan ikki er um eitt avgerðarmál eftir fyrisitingarlógini.

Skjølini vísa, at Eiðis kommuna ikki hevur noterað samskiftið, sum klagarin hevði við kommununa umvegis telefon í juni og september 2024.

Sambært Eiðis kommunu snúði telefonsamskiftið millum klagaran og kommununa seg um, at klagarin ynskti at vita, hvussu tað gekk við umsóknini. Av tí at samskiftið ikki er skrásett, og tað tí ikki ber til at staðfesta, hvat ítøkiliga varð tosað um, ber ikki til at staðfesta, um talan er um upplýsingar, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina. Tí ber ikki til at siga, hvørt notatskyldan, sambært § 6, stk. 1 í innlitslógini, er hildin ella ikki.

Notatskyldan, sambært góðum fyrisitingarsiði, ið áleggur einum myndugleika at skriva upp málsviðgerðarstig, er tó ikki hildin.

Eg haldi tað vera átaluvert, at samskiftið, sum borgarin hevði við kommununa í juni og september 2024, ikki var noterað.

Harumframt upplýsti kommunan fyri umboðsmanninum, at formaðurin í teknisku nevnd segði seg hava tosað við klagaran, men at tað ikki var sum formaður í teknisku nevnd, men sum vinur. Onki telefonnotat var gjørt um samrøðuna millum klagaran og formannin í teknisku nevnd.

Til hetta er at viðmerkja, at býráðslimir ofta bæði hava eina støðu sum politikkari og eina støðu sum umsitari/avgerðarmyndugleiki í einari kommunalari nevnd. Sum myndugleiki hava býráðslimirnir tá, eins og starvsfólk hjá kommununi, skyldu at tryggja sær, at skjøl og munnligir fyrispurningar, sum hoyra til eitt fyrisitingarligt mál, verða skrásett og gerast tøk hjá viðkomandi starvsfólki, sum skal viðgera málið. Formaðurin í teknisku nevnd átti tí beinanvegin at vissað sær, um borgarin vendi sær til hansara sum vin ella myndugleika og handfarið samrøðurnar hareftir.

**Samanumtikið**
Eg fari samanumtikið at geva Eiðis kommunu eina átalu fyri at hava drálað við viðgerðini av málinum og fyri ikki at hava svarað fyrispurningunum frá klagaranum innan rímiliga tíð.

Harumframt fari eg at geva kommununi eina átalu fyri ikki at hava hildið freistina at svara innlitsumbønini, sambært § 16 í innlitslógini, og fyri ikki at hava hildið notatskyldu sína, sambært góðum fyrisitingarsiði.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður